# Japanarar dáma væl tey handilsligu jólini

Hóast nógv teir flestu japanarnir eru shinto-buddistar, so dáma teimum væl tey handilsligu jólini. Men á Jólum eru eingir frídagar. Japanarar hava ættleitt Jólamannin í ein vissan mun. Men Jólamaðurin hevur ikki sama sosiala týdning, sum hann hevur tað í Vesturheiminum. Jólini hava kortini lítið at siga, samanborið við Nýggjársháldið, sum er mest halgaða tíð í árinum. Í mun til Vesturheimin er Jólaaftan eitt kvøld har pør ella bólkar fara út at eta. Jólini eru tíðin tá unnustar geva hvørjum øðrum gávur.

Men tey fyrstu Jólini vóru hildin í Japan, longu í 1552. Hetta árið komu jesuitiskir, katólskir prestar til landið. Fyrsti jesuitta-presturin, ið kom til landið æt Francis Xavier, sum seinni var lýstur at verða katólskt halgimenni. Trúboðarar komu til landið í 1587. Undir Seinna Heimsbardag vóru Jólini, og allir aðrir siðir, ið bóru dám av USA og Vesturheiminum bannaðir. Núverandi keisarin, Akihito fyllir ár 23. desember. Og tað er ein frídagur í Japan!





















